# Tað gongur strúkandi hjá Andrew

**Fremad Amager er oddalið, Lyngby stríðist um ovastu plássini, meðan tað gongur heilt illa hjá Frem og Skjold**

DANMARK 1. DEILD

*Jóannes Hansen*

Hjá tveimum av feløgunum, sum hava føroyskar spælarar á liðnum, gongur tað heilt væl, og hjá hinum báðum gongur tað minni væl.

Hægst á kambinum av føroysku spælarunum er í løtuni Andrew av Fløtum. Fremad Amager er oddalið eftir níggju umfør, og Andrew er besti málskjúttin hjá oddaliðnum. At hann undan ferðini til Ísrael er væl fyri, undirstrikaði Andrew aftur sunnudagin. Hann skoraði tvey mál, tá ið Fremad Amager við sannførandi 4-1 sigri á Kolding, tryggjaði sær fremsta plássið. Fremad Amager er í tættari kapping við Randers og júst Kolding. Øll feløgini hava átjan stig.

Andrew av Fløtum økti til 2-0 í 18. minutti, tá ið hann fluktaði innlegg í málið, og í 31. minutti økti hann til 2-0 við brotssparki. Fýra minuttir seinni var Andrew aftur upp á spæl, tá ið hann legði innfyri úr høgru, og so varð bólturin sendur í Kolding málið til 4-0.

Eftir steðgin var ikki sama ferðin yvir Fremad Amager, sum tað hevði verið. Gestirnir skoraðu eitt mál, men Fremad Amager hevði tó møguleikar at gera fleiri. Eitt nú var tað eina ferð tætt við, at Andrew av Fløtum, sum nú hevur skorað seks mál, fekk bóltin í málið.

Lyngby hevur verið heilt niðri í seriunum og vent, eftir at felagið seinnapartin av níti árunum og skjótt eftir at Todi Jónsson í 1997 var fluttur til FCK fór á húsagang. Nú eru teir aftur í næstbestu deildini, og har eru teir ikki kanónføði. Christian Lamhauge Holst og liðfelagarnir vunnu hesa ferð 2-1 á Eysturbrúgv móti Skjold við Atla Gregersen í miðverjuni. Lyngby er á fjórða plássi við sekstan stigum, meðan Skjold framvegis eigur fyrsta sigurin á. Teir hava bara fingið stig í tveimum javnleikum.

Frem plagar at teljast millum tey fremstu, men higartil í ár hevur gingið syndarliga illa. Sunnudagin átti Frem heimavøll móti Fredericia, sum fór til hús við 2-1 sigri. Frem hevur ikki megnað at vunnið á heimavølli higartil í hesum kappingarárinum. Nýggjur møguleiki verður mikukvøldið, tá ið Frem skal spæla útsetta dystin móti Brønshøj.

Sunnudagin var Jón Rói Jacobsen á vøllinum alla tíðina, og Jónas Þór Næs kom á vøllin, tá ið tað restaðu fimm minuttir.

# Eingin slingur í valsinum

**Toppliðini vunnu sannførandi sigrar, og nú eru SønderjyskE og Esbjerg á plássunum undir strikuni**

SUPERLIGAN

*Jóannes Hansen*

Nú ein triðingur av donsku kappingini er runnin, er einki óvæntað í tí, at FCK og Brøndby eru í toppinum. Eitt sindur meiri óvæntað er tað, at tað hevur eydnast Viborg at halda tørn um støðuna í toppinum. Viborg er eftir 11. umfarið á øðrum plássi - aftanfyri FCK og frammanfyri Brøndby.

FCK vísti onga náði, tá ið teir sunnukvøldið í Parkini høvdu vitjan av Esbjerg, sum tað gongur av skriðuni illa hjá. FCK vann 5-1, eftir at tað í steðginum hevði staðið 1-1. Stóra samrøðuevni í FCK og donskum fótbólti í heyst hevur verið suðurafrikanski miðvallarin Elrio van Heerden. Í fleiri ár hevur hann bíðað eftir møguleikanum, og nú aðrir miðvallarar í summar fóru úr felagnum og hann slapp framat, kann ikki annað sigast, enn at hann rættuliga hevur tikið av. Aftur sunnukvøldið var hann sera eyðsýndur. Van Heerden, sum í støðd og spælistíli minnir ikki sørt um Allan Simonsen, skoraði tvey mál og var við í uppleggjum til onnur. Marcus Allbäck skoraði eisini tvey mál.

Brøndby hevur verið illa plágað av skaðum. Nú eru teir rættuliga komnir fyri seg aftur. Eftir javnleikin móti FCK á heimavølli mikukvøldið vunnu teir leygardagin 3-1 í Odense. Stóru álopsprofilarnir hjá Brøndby eru Morten Skoubo og Johan Elmander, og teir skoraðu øll málini – Morten 2 og Johan 1.

Súni Olsen var ikki á liðnum, tá ið AaB sunnudagin legði rygg til 2-0 tap í Viborg. Toppskjúttin í superliguni í fjør, Steffen Højer, skoraði bæði málini hjá heimaliðnum.

FCM hevur ikki havt hepnið við sær seinastu vikurnar. Í fýra dystum høvdu teir ikki vunnið, og í trimum teimum seinastu landskappingardystunum høvdu teir bara fingið eitt stig burturúr. Sunnudagin vunnu teir á heimavølli 1-0 á Silkeborg, sum ikki hevur tað so lætt.

Heldur ikki hjá AGF gongur tað nakað serligt. Hesa ferð vóru teir fyri fimtu ferð í hesum kappingarárinum á heimavølli og fyri fjórðu ferð fóru teir av heimavøllinum sum taparar. FC Nordsjælland var rættuliga skelkað, tá ið tað fyri nøkrum vikum síðani gjørdist alment, hvussu stórar upphæddir hava verið á skránni í kortspæli, og at ein av spælarunum, Mads Juncker, skuldi hava lumpað liðfelagarnar, so tað stóð eftir í.

Síðani tá hevur gingið sum eftir ánni hjá FCN á vøllinum. 2-0 sigurin í Århus var eisini trivaligur. Omanfyri nevndi kortspælarin skoraði fyrra málið, tá ið klokkan vísti ein minutt og 23. sekund!

Botngysarin var í Haderslev, har SønderjyskE tók ímóti Horsens, sum hevði Johan Byrial Hansen á beinkinum. Síðani Morten Bruun gjørdist venjari í SønderjyskE hevur Rógvi Jacobsen ikki verið á liðnum. Eisini í triðju royndini hjá nýggja venjaranum endaði tað við tapi. Horsens vann 3-1. og vit føroyskum eygum var tað hugaligt at staðfesta, at Johan Byrial Hansen varð settur á vøllin, tá ið tað restaðu nítjan minuttir, og at hann fýra minuttir seinni átti næstsíðsta fótin á, tá ið Horsens staðfesti 3-1 sigurin.

Í donskum fótbólti verður við spenningi sæð fram móti hósdegnum, tá ið trý feløg skulu royna seg í UEFA Cup. Í øllum trimum førunum verður mett, at donsku feløgini eftir fyrra umfarið hava møguleika at spæla seg í bólkaumfarið í UEFA kappingini. Brøndby skal spæla í Zürich. Á heimavølli vunnu donsku meistararnir 2-0. FCM skal spæla á heimavølli móti Moskva, sum teir taptu 3-1 á útivølli móti, og FCK skal í Parkini spæla móti Hamburg SV. Í Hamburg endaði tað 1-1.

**Danska Sas-ligan**

| | | d | v - | j - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | FCK (M) | 11 | 9 - | 2 - | 0 | 22 | 6 | 16 | 29 |
| 2 | Viborg | 11 | 7 - | 2 - | 2 | 25 | 12 | 13 | 23 |
| 3 | Brøndby (S) | 11 | 7 - | 2 - | 2 | 21 | 12 | 9 | 23 |
| 4 | OB | 11 | 5 - | 3 - | 3 | 17 | 13 | 4 | 18 |
| 5 | FC Nordsj. | 11 | 4 - | 4 - | 3 | 18 | 12 | 6 | 16 |
| 6 | FCM | 11 | 4 - | 3 - | 4 | 17 | 19 | -2 | 15 |
| 7 | AaB | 11 | 3 - | 4 - | 4 | 14 | 15 | -1 | 13 |
| 8 | AC Horsens | 11 | 2 - | 5 - | 4 | 6 | 14 | -8 | 11 |
| 9 | AGF | 11 | 2 - | 3 - | 6 | 15 | 22 | -7 | 9 |
| 10 | Silkeborg | 11 | 2 - | 3 - | 6 | 9 | 19 | -10 | 9 |
| 11 | Esbjerg | 11 | 2 - | 2 - | 7 | 12 | 21 | -9 | 8 |
| 12 | SønderjyskE | 11 | 2 - | 1 - | 8 | 14 | 25 | -11 | 7 |

**Føroyskir leikarar:** Johan Byrial Hansen (AC Horsens), Súni Olsen (Aab), Rógvi Jacobsen (SønderjyskE)

**Danska 1. deild**

| | | d | v - | j - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Fremad Amager | 9 | 5 - | 3 - | 1 | 23 | 14 | 9 | 18 |
| 2 | Randers FC | 9 | 6 - | 0 - | 3 | 20 | 12 | 8 | 18 |
| 3 | Kolding | 9 | 6 - | 0 - | 3 | 18 | 15 | 3 | 18 |
| 4 | Køge | 9 | 5 - | 2 - | 2 | 20 | 12 | 8 | 17 |
| 5 | Herfølge | 9 | 5 - | 1 - | 3 | 23 | 11 | 12 | 16 |
| 6 | Lyngby | 9 | 5 - | 1 - | 3 | 20 | 14 | 6 | 16 |
| 7 | NFA | 9 | 4 - | 2 - | 3 | 17 | 14 | 3 | 14 |
| 8 | Vejle | 9 | 4 - | 2 - | 3 | 14 | 13 | 1 | 14 |
| 9 | FC Fredericia | 9 | 4 - | 1 - | 4 | 16 | 15 | 1 | 13 |
| 10 | Ølstykke | 9 | 3 - | 2 - | 4 | 11 | 12 | -1 | 11 |
| 11 | HIK | 9 | 1 - | 7 - | 1 | 11 | 10 | 1 | 10 |
| 12 | Brabrand | 9 | 3 - | 1 - | 5 | 7 | 19 | -12 | 10 |
| 13 | Frem | 8 | 2 - | 3 - | 3 | 14 | 12 | 2 | 9 |
| 14 | AB | 9 | 2 - | 2 - | 5 | 11 | 21 | -10 | 8 |
| 15 | Brønshøj | 8 | 1 - | 1 - | 6 | 7 | 23 | -16 | 4 |
| 16 | Skjold | 9 | 0 - | 2 - | 7 | 7 | 22 | -15 | 2 |

**Føroyskir leikarar:** Gunnar Nielsen Jón Rói Jacobsen, Jónas Þór Næs (Frem), Andrew av Fløtum (Fremad Amager), Christian Holst Lamhauge (Lyngby), Atli Gregersen (Skjold)

**Norska Tippeligan**

| | | d | v - | j - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Start | 22 | 13 - | 5 - | 4 | 40 | 23 | 17 | 44 |
| 2 | Våleranga | 22 | 13 - | 5 - | 4 | 38 | 22 | 16 | 44 |
| 3 | Lyn Oslo | 22 | 10 - | 7 - | 5 | 29 | 19 | 10 | 37 |
| 4 | Lillestrøm | 22 | 11 - | 4 - | 7 | 32 | 27 | 5 | 37 |
| 5 | Viking | 22 | 11 - | 4 - | 7 | 33 | 29 | 4 | 37 |
| 6 | Brann | 22 | 9 - | 5 - | 8 | 37 | 24 | 13 | 32 |
| 7 | Odd Grenland | 22 | 9 - | 3 - | 10 | 22 | 41 | -19 | 30 |
| 8 | HamarKam | 22 | 8 - | 4 - | 10 | 27 | 30 | -3 | 28 |
| 9 | Rosenborg | 22 | 7 - | 3 - | 12 | 40 | 40 | 0 | 24 |
| 10 | Tromsø | 22 | 5 - | 9 - | 8 | 25 | 28 | -3 | 24 |
| 11 | Molde | 21 | 7 - | 3 - | 11 | 32 | 40 | -8 | 24 |
| 12 | Fredrikstad | 22 | 6 - | 5 - | 11 | 28 | 40 | -12 | 23 |
| 13 | Bodø/Glimt | 21 | 5 - | 5 - | 11 | 25 | 34 | -9 | 20 |
| 14 | Aalesund | 22 | 4 - | 8 - | 10 | 23 | 34 | -11 | 20 |

**Føroyskir leikarar:** Todi Jónsson (Start)

**Norska 1. Deild**

| | | d | v - | j - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Stabæk | 25 | 16 - | 7 - | 2 | 46 | 18 | 28 | 55 |
| 2 | Sandefjord | 25 | 15 - | 5 - | 5 | 45 | 30 | 15 | 50 |
| 3 | Hønefoss BK | 25 | 14 - | 5 - | 6 | 43 | 32 | 11 | 47 |
| 4 | Bryne | 25 | 13 - | 7 - | 5 | 50 | 26 | 24 | 46 |
| 5 | Moss | 25 | 13 - | 7 - | 5 | 42 | 22 | 20 | 46 |
| 6 | Pors Grenland | 25 | 12 - | 10 - | 3 | 42 | 29 | 13 | 46 |
| 7 | Sogndal | 25 | 9 - | 7 - | 9 | 40 | 44 | -4 | 34 |
| 8 | Hødd | 25 | 9 - | 4 - | 12 | 42 | 45 | -3 | 31 |
| 9 | Kongsvinger | 25 | 9 - | 4 - | 12 | 34 | 39 | -5 | 31 |
| 10 | Strømsgodset | 25 | 8 - | 6 - | 11 | 35 | 39 | -4 | 30 |
| 11 | Follo | 25 | 8 - | 5 - | 12 | 34 | 41 | -7 | 29 |
| 12 | Mandalskameratene | 25 | 6 - | 8 - | 11 | 37 | 40 | -3 | 26 |
| 13 | FK Tønsberg | 25 | 6 - | 5 - | 14 | 31 | 45 | -14 | 23 |
| 14 | Skeid | 25 | 6 - | 5 - | 14 | 33 | 51 | -18 | 23 |
| 15 | Løv-Ham | 25 | 6 - | 4 - | 15 | 21 | 43 | -22 | 22 |
| 16 | Alta | 25 | 3 - | 5 - | 17 | 22 | 53 | -31 | 14 |

**Føroyskir leikarar:** Atli Danielsen (Sogndal)

**Enska League Championship**

| | | d | v - | j - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Sheff Utd. | 10 | 9 - | 0 - | 1 | 22 | 10 | 12 | 27 |
| 2 | Reading | 10 | 7 - | 2 - | 1 | 19 | 6 | 13 | 23 |
| 3 | Watford | 10 | 5 - | 3 - | 2 | 19 | 12 | 7 | 18 |
| 4 | Luton | 10 | 5 - | 3 - | 2 | 14 | 10 | 4 | 18 |
| 5 | Wolverhampton | 10 | 4 - | 4 - | 2 | 13 | 10 | 3 | 16 |
| 6 | Stoke | 10 | 5 - | 1 - | 4 | 11 | 14 | -3 | 16 |
| 7 | Southampton | 10 | 3 - | 6 - | 1 | 12 | 9 | 3 | 15 |
| 8 | QPR | 10 | 4 - | 3 - | 3 | 9 | 11 | -2 | 15 |
| 9 | Leeds | 9 | 4 - | 2 - | 3 | 10 | 9 | 1 | 14 |
| 10 | Ipswich | 10 | 4 - | 2 - | 4 | 10 | 13 | -3 | 14 |
| 11 | Preston | 10 | 3 - | 4 - | 3 | 11 | 10 | 1 | 13 |
| 12 | Derby | 10 | 2 - | 6 - | 2 | 14 | 13 | 1 | 12 |
| 13 | Hull | 10 | 3 - | 3 - | 4 | 7 | 7 | 0 | 12 |
| 14 | Cardiff | 9 | 3 - | 3 - | 3 | 11 | 12 | -1 | 12 |
| 15 | Crystal Palace | 9 | 3 - | 2 - | 4 | 11 | 10 | 1 | 11 |
| 16 | Leicester | 10 | 2 - | 4 - | 4 | 11 | 14 | -3 | 10 |
| 17 | Brighton | 10 | 1 - | 6 - | 3 | 11 | 14 | -3 | 9 |
| 18 | Norwich | 10 | 2 - | 3 - | 5 | 8 | 11 | -3 | 9 |
| 19 | Coventry | 10 | 1 - | 6 - | 3 | 10 | 14 | -4 | 9 |
| 20 | Crewe | 10 | 1 - | 6 - | 3 | 10 | 14 | -4 | 9 |
| 21 | Plymouth | 10 | 2 - | 3 - | 5 | 7 | 13 | -6 | 9 |
| 22 | Millwall | 10 | 2 - | 2 - | 6 | 8 | 16 | -8 | 8 |
| 23 | Burnley | 10 | 1 - | 4 - | 5 | 14 | 16 | -2 | 7 |
| 24 | Sheff Wed | 9 | 1 - | 4 - | 4 | 6 | 10 | -4 | 7 |

**Føroyskir leikarar:** Claus Bech Jørgensen (Coventry)

Lesið Sosialin - so eru tit við